# Skúli ella ellisheim??? – Hvat meinar tú við, Marin Katrina?

**Tað er einki minni enn ein journalistiskt gøla, at býráðspolitikarar í Havnini ómótsagdir sleppa væl frá at seta málið um 10nda í Kommunuskúlanum upp móti framtíðar bygging av ellisheimi í kommununi ...**

Havnin hevur í løtuni fýra tilboð um 10nda flokk til sín blómandi ungdóm. Fýra tilboð, rótfest í góðum barnaskúlum, sum spjaddir eru út um alla kommununa.

Børn í Havn eru glað um sínar skúlar, og tað stendur foreldrunum frítt at velja skúla til síni børn. Hetta við skúlavalinum er sera týdningarmikið fyri, at børn og foreldur skulu trívast við tey skúlatilboð, sum eru.

Og í býráðnum eru tey av røttum errin av, at borgararnir í høvuðsstaðnum hava so nógv tilboð at velja í – enn ...

**Apropos frítt skúlaval ...**
Men tá ið tað kemur til 10nda flokk er sambært summum býráðspolitikarum brádliga vent í holuni.

Nú skulu foreldur og nemingar ikki longur sleppa at velja.

Nú skal tað ikki longur vera upp til skúlaleiðslu og lærarar at taka sær um reiggj og geva børnunum avbjóðandi og viðkomandi skúlagongd, ið kann fyrireika tey til víðari lesnað, fyrireika tey til arbeiðsmarknaðin.

Á Kommunuskúlanum hava vit lagt okkum eftir at geva næmingunum í 10nda flokki eitt virðiligt alternativ til útlendskar eftirskúlar, og tí er tað rættiliga skakandi at hoyra limir í fíggjarnevnd býráðsins seta okkara 10nda flokk upp ímóti framtíðarbygging av ellisheimum í Havnini.

Men tað ger Marin Katrina Frýdal kortini.

Í viðtali við útvarpið tann 5ta november segði býráðspolitikarin, at tað kemur at kosta kommununi 25 milliónir krónur, um Kommunuskúlin skal sleppa at varðveita sín 10nda flokk ...

... elstu borgararnir koma altso at svíða, tí vit á Kommunuskúlanum ikki frivilliga vilja niðurleggja ta skipan, vit hava arbeitt við at betra seinastu 6 árini!!!

Hoyrir tú teg sjálva, kæra Marin Katrina?

Hoyrir nakar journalistur, hvat tað er, hon sigur?

**25 milliónir ...**
Upphæddin hevur verið nevnd nakrar ferðir. Til dømis nevnir Rúni Djurhuus talið í blaðnum mánadagin 16nda november ...

Men vit mugu spyrja: *hví júst 25 milliónir?*

Hvaðani stavar tað talið?

Hví spyr eingin journalistur seg fyri í býráðnum, hvaðani tey hava hatta talið?

Hví spyr eingin journalistur, hvat meiningin er við, at kommunan setur 10nda flokk á Tórshavnar Kommunuskúla upp ímóti bygginini av einum nýggjum ellisheimi í Havn?

Hví fer eingin journalistur inn og kannar gongdina í málinum um 10nda flokk í býráðnum?

Hví fer eingin journalistur og kannar, hvat 10ndi flokkur á Kommunuskúlanum hevur kostað kommununi seinnu árini?

Á, nei, tað er jú ikki neyðugt at kanna hetta síðsta, tí tað kunnu vit saktans siga tykkum: 10ndi flokkur á Kommunuskúlanum hevur ikki kostað kommununi nakað sum helst útyvir vanligt viðlíkahald seinastu 6 árini ... tí læraralønir eru ein landsuppgáva ...

So tá ið Marin Katrina nevnir tær 25 milliónir krónurnar, standa vit spyrjandi ... hvat meinar konan við?

Kanska tit journalistar kundu spurt Marinu Katrinu Frýdal, tí tá ið vit spyrja hana, sigur hon bara "eingin er áhugaður í at knúsa nakað sundur, sum riggar væl" ... men hví, mugu vit spyrja, setur hon so ynski okkara – at sleppa at gera eitt skúlaarbeiði, sum riggar – upp ímóti bygginini av ellisheimum?

Hví blandar Marin Katrina tvey mál saman, sum einki hava við hvørt annað at gera?

Vit mugu spyrja, tí vit halda, at man missir meiri fyri minni við at taka 10nda flokk úr Kommunuskúlanum!

*Petur Reinert, Rudi Helena Heinesen, Katrin Jákupsdóttir Lindberg, Regin Marnerson, Marjun Dánjalsdóttir, Jóannis Petersen, Jacob Thomsen, Ingun Hentze, Dorthe Gyldenkærne, Jane Hoydal, Hilmar Joensen, Hanna Mikkelsen, Elin Djurhuus, Hjørdis Thomsen, Malan Larsen, Páll Poulsen, Martin Karl Olsen, Angelica Nielsen, Ann-Mari av Skarði, Amalia Poulsen, Malan Eyðunsdóttir, Jóan Pætur Midjord, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Herborg Mikkelsen, Fríðhild Petersen, Hjørdis Heinriksdóttir, Mirjam Jacobsen, Joan Jógvansdóttir, Tonnie Strøm, Jonna Djurhuus, Rúna í Skála, Karin Lange, Árni Vang, Bjørg Djurhuus, Sigri Gaïni, Jóhanna Sofía Petersen, Jón Kragesteen, Malan Dahl, Sólbjørn Mortensen, Harriet Vágadal, Brynhild Kamban, Bergur Samuelsen, Gunvør Højgaard, Louisa Johnsdóttir, Anna Dalsgaard, Lillian Dam Jacobsen, Hansina Husgaard, Bergur Rasmussen.*

# 10 flokkur til Eysturskúlan!

LEVI MØRK

býráðslimur



Marin Katrina Frýdal, býráðslimur, hevur púra rætt í sínari grein, har hon edurgevur tað, umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt

*»at mett varð at ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði. At endamálið við 10. flokki er, at næmingurin meira enn áður skulu kunna seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða nøktandi lærugreina- og breytatilboð. Býráðið hevur tikið avgerð um at skipa nýggju skúlarnar í kommununi úr 1. upp í 9. flokk. Rætt er at lata henda leistin galda fyri allar skúlar í kommununi, og skipa eina sjálvstøðuga 10.. floks eind at taka ímóti næmingum úr øllum skúlunum við tí fyri eyga, at 10. flokkur verður byrjanin til eina útbúgving.«*

Eftir at hava nærlisið álitið um 10. flokkarnar í Havn, fari eg mæla til taka niðurstøðuna í álitinum, at tað skal vera ein eind og hon skal vera í Eysturskúlanum. Tað fer at kosta 25 til 35 milliónir til ábøtur í Kommunuskúlanum, um tað skuldi vera 2 eindir tvs. ein í Eysturskúlanum og ein í Kommunuskúlanum. Eg kenni bæði næmingar og lærarar á báðum skúlum, men eg eri politikari og taki støðu sum politikari í hesum máli og ikki útfrá, um eg kenni onkran har ella her - soleiðis er tað í politikki, tú fornermar onkran og ger onkran annan í betri lag. Men her skal ein støða takast í býráðnum, og tað verður ikki seinastu ferð, at slík mál koma fyri. Annars havi eg stórt rós til tað arbeiði sum báðir skúlar arbeiða við í 10 flokkunum.

Eftir hava fylgt við kjakinum um 10. flokk málið, og tær upplýsingar sum eg havi í málinum, er tað tann rættasta loysnin at hava eina eind og hon skal vera í Eysturskúlanum.

# Jenis av Rana grøðir fíggjarlógina 2010

JÓN JOENSEN



Í Sosialinum mikudag 17.11 er ein grein um lækna, floksformann og umboð fyri Miðflokkin á Føroya Løgtingi, Jenis av Rana, har hann sigur seg at hava prógvað, at Gud er til.

Lata vit Guð fáa frið hesaferð, kunnu vit viðgerða restina av greinini og hennara implikatiónir.

Viðvíkjandi evninum er hann citeraður fyri at siga, at »Eg hugsi ofta um, hvussu nógv tað kundi spart samfelagnum, um vit púra sluppu undan heilivági. Hugsa tær, hvussu nógv vit kundu spart á fíggjarlógini.«

Frá hesum citati og restini av greinini er púra greitt, at Jenis av Rana heldur, at øll sjúka kann lekjast við bøn og at øll líðing kann avhjálpast við at heita á Gud, um at gera tað fyri okkum.

Jenis av Rana er alment settur lækni við ábyrgd fyri heilsuni hjá sínum patientum. Hesa ábyrgd skal hann røkja eftir besta yvirbevísningi og eg ivist onga løtu í, at hann ger júst tað. Trupulleikin uppstendur, tá hansara yvirbevísningur ikki samsvarar við veruleikan, sum vit kenna hann.

Jenis av Rana VEIT, at Gud kann grøða hansara sjúklingar, bara hann sleppur at biðja fyri teimum. Er hetta hansara uppfatan av læknagerninginum, og hevur hetta ávirkan á hansara virki sum lækni, eigur tað at fáa alarmklokkurnar at ringja, bæði hjá hansara patientum og ikki minst avvarðandi eftirliti. Vandi kann vera fyri, at hann fylgir síni bestu sannføring og ordinerar bøn í staðin fyri heilivág, og kann gera óbótaligan skaða á tey, hann hevur ábyrgd av.

Út frá pástandinum hjá Jenisi, um at Gud er til og aktivt grøðir sjúk, um vit bara biða fyri teimum, kunnu vit seta fylgjandi spurningar:

Útskrivar Jenis minni heilivág enn aðrir læknar?

Eru tey, sum hava Jenis sum kommunulækna, betri fyri enn onnur?

Fáa patientar hjá Jenisi av Rana eina ørðvísi viðgerð, enn aðrir sjúklingar í Føroyum?

Eg meti ikki, at tað er ikki í lagi, at Jenis av Rana blandar læknagerningin og religiøsa upplýsing saman. Og slett ikki tá talan ofta er um menniskju, sum eru í dýrastu neyð og tí góðtaka alt teirra lækni sigur. Tá læknin so stendur við avgerðini millum lív og deyða hjá patientinum og spyr um teir skulu biða saman, eru tað nokk ikki nógvir patientar, sum hava yvirskot at nokta.

Jenis av Rana er settur av tí almenna at vera lækni og ikki religiøsur vegleiðari, eins og fólk vanliga fara til lækna at fáa læknaliga hjálp og í kirkju ella samkomu at fáa andaliga hjálp.

Hevur Jenis rætt í sínum pástandi, haldi eg at tað almenna skal taka avleiðingarnar beinanvegin, seta eitt lið av trúgvandi at biða fyri teimum sjúku og niðurlegga allar sjúkuviðgerðandi partar av heilsuverkinum.

Trupulleikin hjá Løgmanni at fáa fíggjarlógina 2010 at ganga upp, er tá loystur.

# Um sparingar á Sandoynni

SÓLVIT SIMONSEN



Tað er ringt at hála mjólk úr boppunum á eini sleptari kúgv, men tað má man siga, verður gjørt við Sandoynna og Suðuroynna, nú skulu pengar finnast, sum mangla í, ja, so mín skel, um teir ikki skulu finnast her í Sandoynni.

Eg haldi, at tit máttu ikki komið tykkum, hvussu skal man royta hár av tí skalluta? Hvat er her at koma eftir? Eg dugi ikki at síggja annað enn at tit, løgtings- og landstýrismenn hava sett tykkum fyri at avtofta Sandoynna og harvið skal tað vera...

Hví eru tit ikki so mikið vaksnir, at tit tora at gera eina langtíðarætlan? Dalbingurin, Jónleif Johannesen, hevur meira enn einaferð, víst á skilagóð uppskot, sum raka allar vegir og tunnlar við einum hægri gjaldi; men tað er sum at sletta vatn á gás, táið tað kemur frá einum vanligum borgara.

Hettar er ikki stór sparing fyri fólkið, sum her búleikast. Tað er fleiri sum arbeiða í vaktum og soleiðis noyðast at siga arbeiði frá sær, vegna mistar túrar og harafturat missa tey pengar av einum dýrkaðum ferðaseðli.

Hevði tað ikki veri ein nokkso fitt sparing at tikið og minka um manningina á tingi, landstýrismennirnar og allan herin av tænastufólkum í landsstýrinum?

Tað er bæði láturligt og grátuligt at hoyra tvætlið í tinginum, hvussu teir royna at spenna seg út. Hvussu teir royna at fáa hvønn annan at siga ósatt. Vælsignaðir menn, hugsið tykkum um, leggið ikki bert eftir ferðaseðlum á sjónum, har er nokk av rulli í forvegin.

Tað er at geva sær tíð og tora at hugsa rætt.